


Malcolm Webb, stjóri í UK Oil & Gas, vitjar her á føroyska básinum á oljumessu. Myndatøka Jan Müller/oljan.fo

# Olja og gass nøkta 70% av bretska orkutørvinum

Deil:

**Jan Müller**

23.07.2014 - 15:34

Oljan.fo

Umleið 70% av orkubrúkinum í Bretlandi stava frá olju og gassi. Hetta vísir ein nýggj frágreiðing **“Delivering UK Energy Investment 2014” frá “Department of Energy & Climate Change” (DECC).**

**Stjórin í Oil & Gas UK, Malcolm Webb fegnast um frágreiðingina, sum hann heldur kann vera eitt gott grundarlag undir framtíðar kjakinum um bretska olju- og gassídnaðin.**

“Sum størsti íleggjari í bretska orkuídnaðinum seinastu 30 árini bjóðar Oil & Gas UK hesi frágreiðingini vælkomnari eins og staðfestingini av, at stjórnin við hesi frágreiðing enn einaferð prógvar, hvussu stóran týdning olju- og gassídnaðurin hevur fyri orkutrygdina hjá Bretlandi.

Vit meta, at henda støða fer at vera óbroytt heilt fram til 2030. Eisini gleðir tað okkum, at stjórnin enn einaferð undirstrikar týdningin av, at olju- og gassvinnan er við til at geva arbeiði til meira enn 450.000 fólk í Bretlandi.

Gass stendur fyri einum fjórðingi av allari elveiting umframt at tað hevur alstóran týdning fyri upphitingina eins og oljan er grundarlagið undir flutningi. UK Oil & Gas ger eisini greitt, at tað viðurkennir tørvin, sum við tíðini verður á einum búskapi við minni $CO_2$ útláti.

“Men henda broyting má fara fram rætt og skilagott og fer at taka fleiri ártíggju heldur enn ár at fremja. Og hesa tíðina fer okkara ídnaður at hava ein týðandi leiklut í strembanini eftir at røkka tað málið.”